Fylgiskjal 4

Uppskot til Løgtingslóg um pantskipan.

Fororð:

Fyrst vil eg siga, at tað er í tøkun tíma at ein felags pant skipan verður sett í verk, sum kundi / brúkari og sum stjóri í sísta miðalstóra handli á útoyggj í Føroyum, Matvøruðbúðini í Nólsoy. At fara frá at sortere allar fløskur " Vit selja " í 3 ymiskar sorteringar ljóðar sum nakað kærkomið. Serliga síðan flest fløskur kom í plastik.

Fyrimunir:

Tað verður sera gott at bara at skula sortera íløt við panti í 3 ymiskar støddir. Tað er nakað ein handil í Nólsoy hevur pláss fyri, so leingi vi bert kunnu taka í móti teimun pant íløtum, sum vit sjólvi selja. Sjálvt um vit síggja at tað kemur nógv íløt inn, sum vit ikki taka í móti.

Vansar:

Vit síggja at tey, sum hava verið við at gjørt lógina og tey í handilsfelaganum, sum hava verið hoyringspartnari, vita ikki hvussu stóran trupuleika tey seta ein Miðal stóran handil úti á útoyggj sum tann sum er í Nólsoy.

Vit síggja at bakarí, pylsuvognar, og bryggjarí fáa undan tøk at taka í móti øllum pant íløtum, eg sum eigi og reki Matvørubúðina í Nólsoy haldi so avgjørt, at ein tílíkur Matvøruhandil sum tann í Nólsoy eisini burdi sloppi við undantaki, og bara tikið í móti teimun íløtum sum vit sjálvi selja.

Hví:

Um summari er sera nógv virksemi í Nólsoy, har nógv lív er, er ofta sera nógv íløt sum pant er á. T.d Øl, vín, dósir og sodavant í stórun tali. Hetta skulu vit eftir galdandi lóg taka í móti og geva pant fyri. Vit kunnu t.d taka Maggies sum í princippinum kann koyra alt oman í handilin hjá okkum at selja, vit kunnu taka øll børn, sum samla øl blikk á ovastevnu, tey kunnu eisini koma í handilin og selja.

Vit hava hvørki pláss, ella kapital at gjalda pant út til øll hesi íløt, sum koma til Nólsoyar. Vit skulu gjalda út pant við kassa 1, fyri síðan einaferð, tá IRF hevur heinta fløskurnar og sagt gott fyri teimun, fáa pantið aftur.

Vit skulu hava eina app, á telefon fyri at tjekka íløt, og tað hava vit ikki arbeiðiskraft til í einum lítlum handli sum í Nólsoy. Vit yvast eisini um Heilsufrøðisliga starvsstovan vil góðtaka, at vit mótaka øll hesi íløt á sama stað, í sama rúmi sum óinnpakka frugt og vøru kemur inn.

Tað er ikki lagt upp til, at teir handlar sum taka íløt inn fáa nakað gjald fyri goymslu ella nakað – Vit skulu leggja pláss og arbeiðis kraft til, sum viðførur bæði at vit mugu leggja pengar út, goymslupláss og arbeiðiskraft til hetta arbeiði, tað lønar seg ikki og viðførur eyka útreiðslur sum við lóg vera áløgd okkum sum ein matvøruhandil í nólsoy

Tað vit selja sjálvi:

Tær fløskur vit sjálvi selja, har geva vit pant og senda retur til havnar. Her hava vit so møguleikar at leggja eitt sindur eyka uppá vøruna, soleiðis at vit ikki hava undirskot av at frakta alt til havnar. Vit skulu jú minnast til at Matvørubúðin far ikki vøru fraktfrítt til Nólsoyar.

Hvat gera hinir handlar:

Lógin leggur eisini um til at kunna samstarva um mótøkur, tað kann so føra við sær at t.d allir handlar í havn, allir Á handlar ella stórir innflytarir sum t.d PH ella PM gera sína mótøku. So fólk sum hava landfast samband koyra til eitt stað, sum er gjørt til endamálið.

En vanti ikki at t.d klubbin fer at koyra sínar fløskur til À við sundsvegin, vanti ikki at cafe natúr koyrur sínar fløskur til samkeyps handilin í Grønlandi.

Hetta verður eftir lógini møguligt at gera í Nólsoy, pop up cafe ír, Maggies, neystcafe, ella kunningarstovan kunnu uttan problem bara koyra alt í handilin hjá okkum, umframt øll onnur sum koma til Nólsoyar.

Allir summarhús gestir, veitslur o.a kunnu bara levera til handilin, og vit gjalda út fyri so kanska við at bíða í langa tíð aftur fáa pengar frá IRF.

Hvat er at gera:

Eg fari at heita á Løgtingið um at t.d miðalstórir handlar á útoyggj sleppa undan at taka í móti øllum íløtum við panti sum t.d ein handil sum tann í Nólsoy

IRF kann heinta tá handilin sigur frá:

Hetta ljóðar sera gott, men vit sum hava sjógv í millum oyggjar, vita at IRF kemur ikki tá vit hava 3 posar fullar, ella 5 posar sum vit seta sum MAX at hava inni.

Vinaliga hugsi um nokk einasta miðalstóra handil í Føroyum sum enn er á útoyggj tá tit koyra hesa lóg ígjørnum løgtingið.

Vh.

Vegna Matvørubúðina í Nólsoy

Brian Hansen